## Ársins Rósa í Klaksvík

Aftur í ár heitir lokalblaðið í Norðoyggjum ”Norðlýsið” á lesarar sínar um at koma við uppskotum um Ársins Rósu í Klaksvík, í samband við tiltakið "Jólaskipið". Hetta tiltak sum hevur verið sera væl móttikið, serstakliga av børnunum, er vorðið ein fastur táttur í jólahaldinum. Fyri nøkrum árum síðani kom hugskotið um at leggja lítla klípið "Ársins rósa" afturat hesum tiltaki, og eisini hetta hevur fingið góða undirtøku. Uppskot til Ársins Rósu kunnu sendast til Norðlýsið, box 58, 700 Klaksvík, við frámerkinum "Ársins rósa".



## Illa fyri í Íslandi

Tey fýra føroysku partafeløgini, sum eru skrásett í keypsskálanum í Reykjavík, kunnu koma illa fyri av nýggju reglunum um gjaldoyra, sum eru komnar í Íslandi, skrivar uf. fo. Stjórin í keypsskálanum, Tórður Friðjónsson, hevur biðið um fund við íslendska tjóðbankan um málið. Hann sigur, at undantak má gerast fyri føroysku feløgini. Tað ber ikki til, at nýggja lógin forðar føroysku feløgunum í at vera skrásett í Íslandi. Føroysku partabrøvini eru skrásett í donskum krónum, og tey verða eisini handlað í donskum krónum í Íslandi. Tórður Friðjónsson sigur við blaðið Vísir, at føroysku partafeløgini gera sjálvi av, um tey halda fram í íslendska keypsskálanum ella tey gevast har, um ikki ber til at gera undantak frá lógini.

# Bergur R. Moberg við nýggjum greinasavni

**Barn av grundsøgum er heitið á nýggjum greinasavni, sum bókmentafrøðingurin Bergur R. Moberg gevur út í næstum**

GREINASAVN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tekstirnir í savninum eru bókmentagreinir, men eisini ummæli, samrøður og minningarorð, sum hava staðið í føroyskum tíðarritum og bløðum seinastu árini. Umleið helvtin av tilfarinum í bókini hevur tó ikki verið á prenti áður.

### Bókmentir og lívsáskoðan

Tekstirnir í Barn av grundsøgum eru vorðnir til í ymsum høpi, men ringja seg um ávís temu sum eitt nú modernitet og metafýsikk. Greinirnar hava fram um alt bókmentir sum fatanar- og tilvísingarkarm. Við støði í at allar bókmentir miðla eina ella aðra lívsáskoðan, tengir høvundurin eitt lívsáskoðanarkjak at bókmentakjakinum.

Her hevur temaið 'avdúking' serligan týdning í bókini. Høvundurin vísir á, at tað eru tey, sum seta javntekn millum avdúking og dirvi til at síggja veruleikan í eyguni. Eins og í sínum undanfarnu bókum minnir hann á, at her fara týðandi brigdi fyri skeyti. Avdúking er neyðugt til tess at vísa á kúgandi valdsbygnaðir, men henda sannkenning av veruleika og sannleika verður tá samanum kemur kortini ov stutt, tí hon hevur sum fyritreyt, at heimurin einans er eitt tøkt fyribrigdi, sum menniskjað hevur atgongd til, og sum kann troytast eftir vild av tøkni og tanka. Hetta er ein einfaldandi hugsan bæði heimspekiliga/lívsáskoðanarliga og samfelagsliga, sum, sambært høvundanum, tíbetur er í dvíning í dag.

Temu annars eru grundsøgur, upplýsing, føroyskur samleiki í einari flótandi, talgildari verð, stirvin heimspekilig hugsanarkervi móttvegis hugmyndasøgu, tulkingarlæru við meira.

Fleiri av tekstunum eru snøggaðir til og dagførdir meira og minni. Tað, sum er mest umráðandi er nútíðin og tann bókin, sum lesarin hevur í hondini og ikki varðveiting av upprunatekstinum fyri hansara egnu skyld. Undantøkini eru ummælini og røðan. Ummæli og røður eru meira tíðar- og tilburðarbundin tekstasløg, og tey standa tískil at kalla óbroytt.

Mentunargrunnur Studentafelagsins gevur Barn av grundsøgum út.




*Vónbjørt Linjonsdóttir hevur gjørt permumyndina til greinasavnið "Barn av grundsøgum" eftir Berg R. Moberg*

# Oddfríður vendir lívinum á høvdið




*Lesarin velur sjálvur, úr hvørjum enda hann byrjar at lesa nýggja yrkingasavnið hjá Oddfríði M. Rasmussen*

**Nýggja yrkingasavnið hjá Oddfríði M. Rasmussen Lívrám kann lesast úr báðum endum, alt eftir, hvat slag av enda lesarin ynskir sær**

YRKINGASAVN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Við nýggja yrkingasavninum fer Oddfríður M. Rasmussen nýggjar leiðir.

Lívrám er í tveimum pørtum. Bókin er soleiðis sett saman, at helvtin av bókini vendir rætt, meðan hin vendir á høvdinum. Tískil kann hon lesast frá báðum endum, men hon kann eisini lesast úr einum enda í annan, alt eftir, um lesarin vil hava hana at enda væl ella illa.

Annar av teimum báðum pørtunum eitur “Lívrám sum viðrakingar.” Hesin parturin er um lívið, og hvussu ein í gloprum, bæði í góðum og illum, verður raktur av lívinum. Hesar yrkingarnar ferðast úr støðum, sum verða hildnar onki at hava at siga og til stórar kosmiskar spurningar, sum vit menniskju hava trupult við at skilja. Hin parturin eitur “Lívrám sum pína í myrkrinum.” Her yrkir høvundurin við sterkum og konsentreraðum myndberingum frá lívinum og skapar ein heim í kistubotninum, har hann knýtir hesi bæði høvuðsevni saman, sum eru at finna í øllum skaldskapi: lív og deyð.

Høgni Egholm Magnussen hevur gjørt permuna á Lívrám. Forlagið Sprotin gevur savnið út.

# Vencil fimti komin

**So er fimta útgávan av skaldskapartíðarritinum Vencili komin, har føroyskir og útlendskir høvundar venda og benda lívsins og listarinnar stóru spurningum**

RIT

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Enn einaferð er tað eydnast ritsjórnini á skaldskapartíðarritinum Vencil at savna so mikið av dygdargóðum tilfari, at tað kann fylla enn eina útgávu av ritinum, sum nú hevur hálvtriðja ár á baki.

### Skaldskapur og permulist

Vencil fimti er býttur í trý evni. Fyrsta evnið kann rópast meta¬skaldsligt við tekstum, sum á onkran hátt viðgera skaldskap ella tað at skapa. Annað evnið er heldur eksistentielt, har tilveruspurningar verða viðgjørdir, meðan triðja evnið viðger á ymiskan hátt handan royndir og vegin hagar.

Høvundarnir og týðarar, sum viðgera evnini eru: A.S. Byatt, sum Pauli Nielsen hevur týtt, Richard Bratigan og John Ashbery, sum Alexandur Kristiansen hevur týtt, Alexandur Kristiansen, N-Jón Ellendersen, Agnar Artúvertin, Grace Paley, sum Gunnar Hoydal og Oddfríður M. Rasmussen hava týtt, Tóroddur Poulsen, Ludvík Breckmann, Annika Skaalum, Steinbjørn B. Jacobsen, Kim Simonsen, Paul Celan, sum Heðin M Klein hevur týtt, Hanus Kamban, Franz Kafka, sum Hanus Kamban hevur týtt, Randi Ward, sum Óla Jákup Niclasen hevur týtt, Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, Oddfríður Marni Rasmussen, Kjartan Hansen, Vangur Streymoy og Katrin Reinert.

Eins og í hinum útgávunum, er permumyndin á Vencili eitt listaverk í sær sjálvum.

Hesa ferð hevur før¬oyski listamaðurin Bárður Jákupsson verið á Grafiska verkstaðnum og mynd¬prýtt permuna. Myndaevnið er úr søguni “Ein steinkvinna”, sum A.S. Byatt hevur skrivað, og sum Pauli Nielsen týtt til Vencil fimta.

### Maratonupplestur

Í samband við at Vencil fimti kemur út, og at bókmentadagar eru í Havn 4.-7. desember, fara høvundar, sum hava skrivað í teimum fimm numrunum higartil og aðrir gestahøvundar at lesa marathonupplestur í Reinsarínum 4. desember klokkan 20:00. Lisið verður uttan steðg í 3-4 tímar. Millum teirra, sum tá fara at lesa upp, eru Heðin M. Klein, Katrin Reinert, Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, Sigri M. Gaini, Kim Simonsen, Bárður Persson, Vónbjørt Vang, Oddfríður Marni Rasmussen, Carl Johan Jensen, Hanus Kamban og fleiri onnur.

Lisið verður uttan steðg í 3-4 tímar.

Tað eru teir báðir Oddfríður M. Rasmussen og Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, sum ritstjórna Vencil.




*Bárður Jákupsson hevur gjørt permumyndina á Vencili fimta við íblástri úr stuttsøguni "Ein steinkvinna" eftir A.S. Byatt*